# Javnt í Irak

Uppteljingin aftan á tjóðartingsvalið í Irak seinasta vikuskiftið bendir á, at tað er rættiliga javnt millum núverandi og fyrrverandi forsætisráðharran. Tá 30 prosent av atkvøðunum vóru taldar, var Nuri al-Maliki, forsætisráðharri, á odda í teimum báðum shiamuslimsku landspørtunum har suðuri í landinum. Har norðuri í landinum er fyrrverandi forsætisráðharrin Iyad Allawi á odda í tveimum landspørtum. Í tí kurdiska økinum hava teir kurdisku flokkarnir fingið tær flestu atkvøðurnar. Uppteljingin skal verða liðug tann 18. mars, men tað kunnu ganga vikur, til úrslitið kemur, skrivar AFP.



# Bumba drap tólv

Í minsta lagi tólv fólk doyðu, tá ein sjálvmorðsbumbumaður sprongdi seg í luftina á einum sølutorgi í pakistanska býnum Lahore í morgun. 35 onnur fingu skaða. Løgreglan í Lahore sigur, at álopið var eftir øllum at døma ætlað einum hernaðarakfari, og fleiri hermenn eru millum teirra, sum fingu skaða. Hetta er onnur sjálvmorðsbumbuatsóknin í Lahore hesa vikuna. Tann fyrra kravdi 13 mannalív. Tað hevur annars verið toliliga friðarligt í Pakistan í seinastuni, eftir at landið varð illa plágað av bumbum frá Taliban og al-Qaeda í vetur.



*Thomas Dam, formaður í Búskaparráðnum, vísir á nakrar ítøkiligar møguleikar at skera niður upp á útreiðslurnar, sum er alneyðugt fyri at fáa javnvág aftur á fíggjarlógina*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

er í yvir árini. Vit eiga at syrgja fyri, at gott avlop er í góðum árum og ikki freistast at nýta tað yvirskotið, men leggja tað til síðis. So kunnu vit betri góðtaka eitt hall í ringum árum, sigur Thomas Dam.

## Tilfeingisgjald

Tað er eingin loyna, at serliga fiskivinnan hevur ilt við at fáa endarnar at røkka saman. Hvussu væntar Búskaparráðið so, at serliga fiskivinnan hevur ráð at gjalda eitt tilfeingisgjald?

- Nú veldst um, hvussu eitt slíkt gjald verður snikkað til. Tað hava verið ógvuliga nógvir tankar uppi og vent, og vit hava ikki lagt okkum á nakað ávíst. Vit hava bara víst á, at tá tú hevur eina vinnu, sum troytir tað náttúru tilfeingi, sum er, og sum vit øll eiga, so er tað ræt,t at rindað verður fyri tað og ein ikki bara fær tað forerandi. Eisini tí vit síggja innan fyri fiskivinnuna, at til ber at selja hesi rættindi víðari, sigur Thomas Dam.

Hann vísi til, at innan oljuvinnuna er talan um ein kolvetnisskatt, sum er settur saman á ein serligan hátt, eisini soleiðis, at fær vinnan ein óvanliga stóran vinning, verður skattur rindaður eftir tí. Teir tankarnir hava eisini verið frammi í Búskaparráðnum.

- Í Ólavsøkupakkanum er eisini eitt uppskot um eitt víddargjald, sum eisini er eitt slag av tilfeingisgjaldi, og vit hava so gjørt okkum tankar um, at javnseta hesar vinnurnar soleiðis, at vit fáa eitt líknandi tilfeingisgjald fyri fiskivinnuna, sigur Thomas Dam.

Hann sigur, at tað finnast fleiri mátar, sum hetta kann gerast upp á, men at skipanin er rættiliga fastløst fram til 2018, tá verandi loyvir ganga út.

- Tað ber ikki til at fara inn í tær avtalurnar, og tí hava vit lagt upp til, hvussu vit kunnu gera nakrar tillagingarloysnir, og hava nøkur uppskot til tað. Men tað er umráðandi, at goldið verður fyri tey loyvir, ið givin verða, sigur Thomas Dam.

Hann heldur, at júst við at loyvini verða seld til hægstbjóðandi tryggjar, at sunn kapping kemur í vinnuna, tí tað vilja til eina og hvørja tíð verða tey dugnaligastu reiðaríini, ið fáa mest burtur úr, sum ogna sær fiskiloyvini.

## Almenn skuld

Eitt av tilmælunum hjá Búskaparráðnum er ognarskattur, men fyri at seta ein slíkan í verk er neyðugt, at ognirnar fyrst verða mettar í virði.

- Í dag finst eingin nøktandi skipa í Føroyum í so máta, og tí er tað ein fyritreyt, at ein almenn meting av virðinum á fastognum fæst í lag. Men tá tey viðurskiftini eru komin í rættlag er einki til hindurs fyri, at ognarskattur verður settur í gildi, sigur Thomas Dam.

Men eitt eru ymsu tiltøkini, sum skulu setast í gildi, eitt annað er, hvussu leingi tað kann draga út, áðrenn javnvág aftur kemur á fíggjarlógina.

- Tað, sum vit hava sagt, er, at tað er umráðandi at fáa tamarhald á støðuni. Tað er helst ógjørligt at umganga, at vit fáa eina ávísa almenna skuld, tí bara í ár fáa vit eitt hall á fíggjarlógini á 850 milliónir krónur, og tað eru ófatiliga nógvir pengar. Tað er ikki gjørligt at fáa eitt hall av teirri stødd burtur beinanvegin og tað vil so siga, at vit fara at hava eina skuld í nøkur ár fram, sigur Thomas Dam.

Búskaparráðið heldur tó, at av tí at almenna skuldin ikki er so stór at byrja við, tola vit at hava hall í nøkur ár.

- Men neyðugt verður at gera nøkur tiltøk beinanvegin soleiðis, at vit fáa tamarhald á hallinum og teirri vaksandi skuldini. Vit meta, at um hildið verður aftur upp á almennar útreiðslur og vit megna at gjøgnumføra tað slag av tiltøkum, sum Búskaparráðið mælir til, ber til at umganga, at almenna skuldin fer upp um 40% av BTÚ, ið er eitt mál, ið verður brúkt at samanlíkna almenna skuld millum lond, sigur Thomas Dam, formaður í Búskaparráðnum.